ÁVARING OG LEIÐNING

viðvíkjandi havhestaungum

Í ár er bannið móti at taka havhestaungar ikki uppaftur tikið fyri fyrstu ferð í mong ár. Hetta er ein roynd, og tað er tí ógvuliga umráðandi fyri at gera smittuvandan so lítlan sum møguligt, at teir, sum halda seg til at taka havhest, gjølla fylgja hesum ráðum:

1) Teir, ið sláa havhest, eiga at vera í oljuklæðum og at tvága hesi og øll klædnaplögg, teir hava verið í, væl, tá veiðan er av.

2) Ongantíð at taka ungar, sum eru rak, og sum sita og hanga á sjónum. Eru tílíkir av óvart tiknir, tá eiga teir beinan vegin at verða blakaðir avstað aftur.

3) Tá fuglurin verður handfarin (undir veiðuni, skoldingini og aðrari viðgerð), eigur at verða ansað væl eftir minst møguligt at dálka seg út í spýggju og skarnj og altíð at tvága hendurnar væl, áðrenn farið verður at fáa sær, festa sær í o. s. fr. Aftaná at hendurnar eru tvignar, skal verða mælt til at skola tær í hesum: 5 kloramintablettir *ella* 1 súpuskeið av kloraminpulvuri (fæst á apotekinum) loyst upp í 1 litri av vatni.

4) Ongantíð at bera fuglin heim til hús, fyrr enn hann er saltaður, men at lata alla viðgerðina fara fram í neystum ella øðrum húsi burtur frá seiðhúsum.

5) Ongantíð royta fuglin, men *altíð at skolda hann* (umleið 3 minuttir í kókandi vatni) og síðani strúka fjøðurina burturav.

6) At koyra fjaðrar (sum eru tað mest smittandi), veingir, bein o. s. fr. á sjógv, helst á streymasjógv, ella at grava tað væl niður.

7) Halðið øll óviðkomandi, konufólk og børn — *serliga kvinnar, sum eru við barn burtur frá fugli og fjaðrum.*

8) Tey, sum fáa illtanka um, at tey hava fingið sjúkuna (sí grein aðra staðni í blaðnum um hesa sjúku) eiga beinan vegin at venda sær til egnan lækna.

Av tí at meslingar ganga heldur víða í lótuni, og tað altíð er ringt at fáa tvær sjúkur ísenn, eiga fólk, sum hava ikki havt meslingar, og sum kanska eru smittað, í ár at halda seg frá hesi veiðu.

LANDSLÆKNIN, Tórsh., 14.8.54.
H. D. Joensen

LÆKNAMÁLIÐ

14. sept. er illur, tí Dagblaðið hevur sagt, at teir »*slakaðu* í læknamálinum«. Hetta er einki at vera erkvisin av, tí øll vita, at tjóðveldismenn ikki bert »slakaðu« men sviku, tá ið á stóð. — Løgtingstíðindi fyri 1953 er besta prógv um hetta. Ásannandi at teir so dyggiliga rendu hövdið móti múrinum við uppskoti teirra í 14. sept. fyri stuttum, koma teir nú og biðja um fyrigeving við hesum orðum, ið Norðoyingar av ringum royndum vita eru tóm vallyfti: »*Dagur aftan á valið kemur tó at sýna, hvør ið veruliga vildi loysn í læknamálinum og hvør ið tosaði monnum eftir munni.*«

Tær fyrstu byrðirnar

Smáligt gongur við hoyggingini. — Framvegis er lítið og einki sligið í flestu bygdum. Suðuri í Vági var fyrsta byrðan innborin týsdagin. Norðanfyri er verri. T. d. varð tað fyrsta sligið á Viðareiði seinasta leygardag.

SKOTLANDSFERÐ K.Í.

Týsdagin komu Kí'arnir aftur úr Skotlandi við Poppy. Teir lata óføra væl at ferðini. Úrslitini av dystunum vóru hesi:

Í Fraserburgh 10—2 til Fraserb.gh. Í Inverurie 4—4. Í Aberdeen 2—1 til Kí. Í Elgin 6—0 til Elgin. Í Stonehaven 2—2.

FØROYAMEISTARAR

HB dreingirnir gjørdist Føroyameistarar, tá ið teir seinasta sunnudag vunnu TB dreingirnar við 8 móti 3. — Í semifinaluni í hondbólti millum gentur vann Neistin TB við 9—3. — Sama dag vann H lið hjá Kí Vágbingar við 4—1 í Klakksvík.

KOLAMÁLIÐ

Sum kunnugt er, hevur tað nú í nógv ár gingið syndarliga illa hjá Hvalbingum at sleppa av við tað kol, teir hava framleitt — langt minni tað, teir annars kundu verið førir fyri at framleitt.

Tað hevur tí ferð eftir ferð verið heitt á okkara myndugleikar, sum t. d. landsstýrið, fyri at royna at fáa tað til at byrgja fyri innfluttningum av útlendskum koli, og hava teir altíð játtað og givið góð lyfti — og heldur einki annað hevur spurtst burtur úr.

Og nú lá tað soleiðis fyri, at um Hvalbingar skuldu teinkja um at halda framá við hesi vinnu og ikki arbeiða fyri heilt einki, so mátti sjálvandi nakað verða gjørt nú, annaðhvørt tað kom at hjálpa ella ikki.

Skriv varð tí sent tinginum nú á ólavsøku harí tað varð heitt á tingið um at fáa rúmari sølulíkindi. Annars hevur áheitan (umsókn) okkara verið endurprentað í 14. sept.

Higartil hevur einki verið at sæð í blöðunum um tað, at hetta mál hevur verið framborið í tinginum fyrr enn nú í Dagblaðnum fyri týsdagin 10. aug. Har standa ymiskir upplýsingar frá M. Holm í samband við umsókn okkara, og sum ikki er samsvarandi við tað at formaður okkara Martin Thomsen upplýsti Hvalbingar um í dansistovuni, aftaná tann samráðing-

Framhald á 4. síðu.

BRIMNES hevur landað 170 ks. av agnsild og 27 tn. av saltsild í Vági. Telefonin var í ólagi.

Áttandi føroyski happadráttur

Dráttarlisti

fyri 1. drátt 19.-8.-54.

Hesi nummur hava vunnið:

1000 kr. nr. 1471
500 kr. nr. 1164
200 kr. nr. 360 — 1491
100 kr. nr. 54 — 130 — 135 — 139
145 — 147 — 225 — 346 — 367
379 — 405 — 447 — 457 — 475
487 — 497 — 541 — 543 — 563
584 — 661 — 666 — 667 — 673
712 — 716 — 808 — 858 — 906
907 — 938 — 968 — 1045 — 1055
1075 — 1083 — 1096 — 1119—1140
1146 — 1189 — 1195 — 1202—1237
1242 — 1281 — 1287 — 1320—1446
1490

Vinningarnir verða útgoldnir beinan vegin við frádrátti av 10 %. Vinnarar verða bidnir um at venda sær til happadráttaseljarar sínar.

Tórshavn, tann 19. august 1954.
FØROYA LANDSSTÝRI
(Happadrátturin).

SKRIVSTOVUPLÁSS

Maður ella kvinna søkist til skrivstovu í stórari bygd. Kennskap til skrivstovuarbeiði fyrimunur.

Prentsm. vísir á.

Brot úr røðu
P M DAMS
undir viðgerðini av REALKREDITT-STOVNINUM

Byrjaði við at takka teimu mmonnum, ið avrikað høvdu bókliagin um okkara fíggjarligu viðurskifti.

Klettar okkara eru berligir. Tað mugu vit ásanna; men tess størri verður kravið til hvønn einstakan, tá ið tað ræður um at taka tey ódnartøk, ið skulu til fyri at skapa trygg livilíkindi fyri hvønn einstakan her á landi.

Vøksturin í fíggjarlívi okkara hevur ikki verið so miðvísur, sum hann skuldi, og tíverri eru mistøk gjørd, bæði á landi og serstakliga á sjónum.

Vit hava ikki havt ta hagskurðslu, sum onnur lond at tikið til og hava tí ikki reiðililga kent líkindini fyri framtíðini. Var betri skil á hesum øki, vildi eisini havt verið frægari burtur úr, og vit vildu verið frægari farnir.

Hetta uppskot, ið her liggur frammi, verður ikki at loysa hin stóra spurningin: veiðuskip til allar okkara fiskimenn. Tann peninganøgd, ið her er talan um, verður ikki at rökka til at loysa henda fyri okkara samfelag so brennandi spurning. Tað verður tí neyðugt at finna fram til størri peninganøgdir fyri av sonnum at kunna útbyggja vinnulívið. Her mugu løgting og stáur skoyta uppí og tað so munandi, at endurnýggjanin kann fremjast í bræði. Fiskimenn rópa eftir nýmótans veiðuførum; tað má tí verða løgtingsins skylda í samvinnu við ríkisdagin at útvega tær neyðugu peninganøgdir, so fiskimenn fáa tey neyðugu amboðini, ið eru treytin og grundstuðulin undir øllum lívi her á landi.

Tað er harmandi, at húsabyggigrunnurin, ið er av so stórum týdningi ikki er komin við á hesum sinni. Men tað verður løgtingsins skylda at leita tær leiðir, so eisini aðrir tættir, húsabygging ,idnaður ,kommunal lán o. s. fr. koma uppí.

Men fyrst og fremst geldur tað skipaflotan.

Tað arbeiði og tær ætlanir, ið nú eru frammi, mugu ikki bert verða eitt uppskot á pappírinum, men ein veruleiki. Fyrj tann ,ið kennir stöðu fiskimannsins, er at óttast fyri ,at endurnýggjanin ikki verður nóg skjót, tí nú eru inntökur fiskimanna í nógvum førum vorðnar so smáar, at tær liggja niðanfyri tað markið, ið neyðugt er fyri at bjarga fiskimonnum, teirra konum og børnum undan hungri og halli.

Úr realkredittstovninum kann bert lænast 50 pst. av skipavirðinum. Einki fæst frá landsstýrinum. Hvussu skal so hin helvtin av peninginum fáast til vegar? Hvusu verður hjá monnum at útvega tey 15 pst., tá ið ein skonnart kostar 1 milj. kr.?

Her má alt gerast greitt. Lat allar tættir koma við. Øll tök mugu takast fyri at fáa peningin til vegar. Fyrr verður skipið ikki ein veruleiki.

Tað, at tað skal vera solidariskt við veðhaldinum, vil möguliga minka um álitið, tí vit mugu ásanna, at hjá okkum eru konjunkturirnir so brótandi, øðrvísi í Danmark, har eru teir í meira fastari legu, svinga ikki so nógv hvønn vegin.

Eisini mugu vit ásanna og viðganga tað sykologiska í hesum máli, ikki minst hvat tí solidariska veðhaldinum viðvíkir; tí vit mugu minnast til, at vónloysið hevur tikið fiskimenn av tí, at teir fáa ov lítið. Niðurstðan má tó í øllum førum verða tann, at vit fáa skipini ,vit mugu hava tey fyri einhvønn prís.

Tað neyðuga við einari skjótari endurnýggjan av okkara sipaflota hava javnaðarmenn stöðugt hildið fram, og longu í 1944 settu vit fullfíggjað uppskot um eina stórfingna heildarætlan fyri at fremja hesa endurnýggjan. Men hetta stórsligna uppskot, sum er prentað í bóklinginum ARBEIÐI TIL ØLL Á SJÓGV OG LANDI, og sum til fullnaðar vildi havt loyst spurningin um endurnýggjan av okkara skipaflota, feldu aftanhaldsflokkarnir. — — — — Úrslitið av teirra politikki kenna allir. Vit fingu tí nógv ovurdýr og órentabil veiðuför til landið. Í hesi veiðuför settu fiskimenn alt teir áttu, og teir, sum tá ikki vildu váða nakað, standa í dag við opnum örmum og sópa hesi skip fiskimanna til sín.

Hetta má ikki henda uppaftur, og tí má tingið taka stórtök og leita fram alla ta peningaorku, ið vit saman við danska ríkiskassanum kunnu útvega.

Í dag verða vígd í Nakskov Hilma Viðsteein úr Havn og Jens Ole Petersen, cand. mag. úr Keypmannahavn. Adr.: Fastings Alle, Nakskov.

FÆRØSK MARGARINE

VITA № 1

VITAMINISERET

FÆRØSKT PRODUKT FINT PRODUKT

Grót og skervur.

Øll, ið vilja keypa skerv ella grót eiga at venda sær til kommunukantórið.

Grót og skervur megu verða goldin fyrst, áðrenn tey verða heimtað.

Bilstjórar verða ámintir, at teir ikki kunnu heimta grót ella skerv uttan við einum limi av vegnevndini ella einum umboðsmann fyri kommununa.

Fróðbiar søknar kommuna

Skipafelagið Føroyar

Telefon 1225

Tórshavn